# Føroyingar skulu ikki hava serrættindi

**– Ein føroyingur skal ikki hava betri sømdir enn ein pakistani ella kurdi, sigur Erik Farmann, leiðari í upptøkunevndini á Danmarks Journalisthøjskole. Farmann metir eisini, at ein umsøkjari, sum bert sleppur inn við sersømdum, ikki er egnaður til Journalistháskúlan**



FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Danmark er eftirhondini vorðið eitt multietniskt samfelag, og við støði í hesi gongd var reglan um framíhjárættindi til føroyskar umsøkjarar foroldað. Tað metir leiðarin í upptøkunevndini á Danmarks Journalisthøjskole, Erik Farmann.

– Endaliga avgerðin er tikin í Undirvísingarmálaráðnum, men vit í upptøkunevndini mæltu til at broyta reglugerðina við teirri grundgeving, at føroyingar ikki skulu hava serrættindi fram um aðrar etniskar minnilutar í danska samfelagnum, sigur Erik Farmann.

**Fortreytir**

Umframt hesa grundgeving sigur Farmann, at Journalistháskúlin heldur ikki ynskir næmingar, sum frá byrjan ikki hava fortreytir fyri at klára seg væl á skúlanum.

– Um ein næmingur úr Føroyum sleppur inn við einum sekstali, bert tí hann er úr Føroyum, eru fortreytir hansara fyri at standa seg væl á skúlanum ikki til staðar. Á øllum hægri lærustovnum eru upptøkukrøvini tey somu fyri øll, og tað skulu tey eisini vera hjá okkum, metir Erik Farmann.

Hann leggur afturat, at teir flestu føroyingarnir, sum seinnu árini hava gingið á skúlanum, høvdu sloppið inn uttan nakrar sersømdir. Sambært honum hava føroyingar tí ikki brúk fyri serligum upptøkureglum, og tí fer broytingin heldur ikki at lække um útbúgvingarstøðið millum føroyskar journalistar.

Spurdur, hví eingin av teimum 12 føroysku umsøkjarunum so er upptikin í ár, eftir at nýggju reglurnar eru settar í gildi, svarar Erik Farmann:

– Nú hevur reglan bert verðið galdandi í ár, og tí er ov tíðliga at draga ta niðurstøðu, at føroyingar ongan møguleika hava undir nýggju krøvunum, sigur Erik Farmann til seinast.

# Plássini su

**Finn journalistin! Hetta kann blíva ein megintrupulleiki hjá føroyskari press føroyingar ikki hava nakra journalistiska útbúgving sjálvir. Nøkur harmast m egnu fjølmiðlaútbúgving á stovn. Eftir stendur so spurningurin, hv**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*& Theodor E. D. Olsen*

Reglan, sum fyrr gav føroyingum, íslendingum og umsøkjarum úr Suðurslesvík sersømdir at sleppa inn á danska Journalistháskúlan í Århus, hvarv tann 6. mars í ár, tá danska Undirvísingarmálaráðið saman við Danmarks Journalisthøjskole broytti endamálsorðingina.

Undan hesi broyting sluppu á hvørjum ári báðir teir bestu føroysku umsøkjararnir inn á Journalistháskúlan, um teir stóðu royndina við einum sekstali ella hægri. Eftir at tey seks reserveraðu plássini til umsøkjarar úr Føroyum, Íslandi og Suðurslesvík eru horvin, eru allir umsøkjarar uttan mun til landafrøðiligan uppruna nú javnstillaðir, og tað gevur føroyskum umsøkjarum verri møguleika at sleppa inn og kann økja um trupulleikan við vantandi útbúgving millum føroyskar journalistar.

Útvarp Føroya hevði innsløg um málið í seinastu viku, og í eina innslagnum varð greitt, at mentamálaráðharrin Jógvan á Lakjuni ikki visti um broytingina. Aðrastaðni á hesum síðum sigur hann, at danska Undirvísingarmálaráðið




**FAKTA**

**LØGTINGSLÓG NR. 61 FRÁ 16. MAI 2006 UM KRINGVARP**

§ 6

Stk. 3. Stjórin eigur at taka atlit til journalistiskan førleika, tá ið størv verða sett á tíðindaeindunum

§ 10

Stk. 2. Kringvarp Føroya eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum. Kringvarp Føroya hevur skyldu at tryggja starvsfókunum holla málsliga ráðgeving.

# Seinasta skumpið til føroyska journalistútbúgving

**- Herdu krøvini til upptøku á Danmarks Journalisthøjskole er vónandi seinasta skumpið, sum fær okkum at seta á stovn egna journalistútbúgving í Føroyum, sigur Uni Arge, journalistur**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*



- Hetta er eitt signal um, at vit sjálvi skulu taka okkum um reiggj og seta á stovn føroyska journalistútbúgving.

Útbúni tíðindamaðurin Uni Arge, sum í dag er fjølmiðlaráðgevi í Føroya Banka eftir at hava starvast sum tíðindamaður í nøkur ár, er ikki í iva um, hvussu føroyskir myndugleikar skulu fyrihalda seg til herdu krøvini til upptøku á Danmarks Journalisthøjskole.

- Í dag er minni enn helmingurin av føroyskum journalistum útbúnir, og tað er als ikki nóg gott. Avleiðingin av nýggju krøvunum kann væl gerast, at útbúgvingarstøðið í føroyska fjølmiðlaheiminum verður enn verri, og tað gongur ikki. Tí mugu myndugleikar handla nú, sigur ein avgjørdur Uni.

Boðskapur hansara er fyrst og fremst stílaður til Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið og teimum, sum vara av føroyska fjølmiðlaheiminum.

**Útheimurin eitt krav**

Uni Arge metir ikki, at tað hevði verið trupult at sett á stovn føroyska journalistútbúgving, tí stórir partar av fakliga útboðnum eru longu veruleiki á Setrinum. Føroyskt, samfelagsfrøði, søga, altjóða politikkur og búskapur skulu sambært Una vera grundsúlur í nýggju útbúgvingini, og hesar tænastur eru longu tøkar. So manglar bert sjálvur journalistikkurin.

- Vit hava nógvar royndar journalistar í landinum, sum kundu verið seinasti liður í eini journalistútbúgving. Viðvíkjandi fakliga útboðnum eru vit tí ikki so langt frá eini fullfíggjaðari útbúgving í journalistikki, metir Uni Arge.

Útbúgvingin kundi sambært fjølmiðlaráðgevanum í Føroya Banka tikið trý til fýra ár við tí kravi, at eitt ár av bæði skúlagongd og praktikktíð skulu takast uttanfyri landoddarnar.

- So høvdu vit samstundis varðveitt sambandið úteftir og givið næmingunum altjóða royndir, sum lesandi í dag fáa uttanfyri landoddarnar, sigur Uni Arge.

**Føroyskt mál**

Spurdur, hvat hann heldur um nýggju avgerðina hjá danska Undirvísingarmálaráðnum og Journalistháskúlanum, er Uni greiður.

- Hetta er eitt føroyskt mál, sum skal avgreiðast í Føroyum. Vandin við broytingini er, at enn færri journalistar fáa møguleikan at útbúgva seg, men hetta er samstundis ein kærkomin møguleiki til at taka málið upp í Føroyum, og tað áttu myndugleikarnir at gjørt beinanvegin, sigur Uni Arge at enda.